TÍÐARGREIN

til Felagið Nótaskip



…dagur 4. apríl 2014 · Nr. 40

R

NI

indi verða bara latin, fyri at stovnarnir ikki skulu av-oyðast.

2,2 milliardir í fórið

Nýggja makrelavtalan førir við sær, at yvirskotið í pelagisku vinnuni verður enn størri, tí føroyingar fáa betur atgongd til stovnin. Haraftrat eru endurmetingar av stovninum gjørdar, og tað merkir, at veiðan verður enn størri og tískil verður avreiðingarvirðið størri.

– Yvirskotið hjá uppsjóvarflotanum hevur verið um 250 mió. kr. seinastu árini og eigararnir hava seinastu árini tikið um 150 milliónir út í vinningsbýtið um árið. Komandi 4-5 árini fer yvirskotið í pelagisku vinnuni at vera góðar 750 milliónir krónur árliga, so roknast kann við, at eigararnir fara at taka sær um 5-600 milliónir út úr vinnuni um árið, sigur Kári Petersen.

– Hetta merkir, at yvir eitt fýra ára skeið kunnu eigararnir taka sær um 2,2 milliardir út í vinningsbýti. Hyggja vit at tølunum, hava feløgini seinastu trý árini tikið alt yvirskotið út, so tað er sannlíkt, at teir gera tað framyvir eisini, sigur Kári Petersen.

Fríggjadagur 4. apríl 2014 · Nr. 40

Hugskot og viðmerkingar – send sms til 225000 VIKUSKIFTI Sosialurin | 7

FISKIVINNUPOLITIKKUR

UPPSJÓVARVINNA Avreiðingarvirðið er farið úr 400 milliónum og upp í 2 milliardir, men landsstýrið vil ikki taka pengar fyri nýggju veiðirættindini

– Eigararnir av pelagiska flotanum hava seinastu fýra árini tikið 500 milliónir út úr feløgunum sum vinningsbýti. Framyvir kunnu teir taka umleið 5-600 milliónir út um árið, í øllum førum næstu 4-5 árini, sigur Kári Petersen

Útflutningsvirðið hækkar

Útflutningsvirðið hjá pelagiska flotanum var 400 milliónir í 2008-2009 og kom uppá 1,03 milliardir í 2013. Frá og við í ár fer útflutningsvirðið at vera góðar 2 milliardir krónur orsakað av nýggju makrelavtaluni og endurmetingum av stovninum.

Tað er tí líkt til, at makrelveiðan í nøkur ár verður væl størri, enn hon hevur verið seinastu árini.

– ICES-fiskifrøðingar hava hildið makrelstovnin verið umleið 4 milliónir tons. Norðmenn halda hann vera umleið 9 milliónir tons. ICES mælti í fjør til, at heildarveiðan kundi vera 544 túsund tons. Nú heldur ICES, at ráðiligt er at fiska 890 túsund tons, sigur Kári Petersen.

– Hetta kundi verið eitt gott høvið til at sett gjald á tilfeingið. Avreiðingarvirði økist við 1.600 milliónum samanborið við 2009, har tað lá á 400 milliónum, men hetta hevur ikki fingið politkarar at broyta kós.

– Føroysku politikararnir velja heldur at taka hesa upphædd frá Føroya fólki og geva eina milliardagávu til nakrar fáar ríkar reiðarar í staðin fyri at selja veiðirættindini og geva vanligum løntakarum ein skattalætta á 2.500 kr. um mánaðin, sigur Kári Petersen.

3 milliardir úr pelagisku vinnuni

Leggja vit tær 500 miliónirnar aftrat, sum longu eru tiknar út úr pelagisku vinnuni, so eru vit uppi á 2,5 - 3 milliardum, sum nakrir einstaklingar kunnu taka sær til privata nýtslu bara í pelagisku vinnuni. Eru eigararnir umleið 10, so eru einar 275 milliónir krónur í part.

Kári Petersen sigur seg hava torført við at skilja, at politikararnir í Føroyum halda tað gagnar vinnuni í Føroyum, at nakrir fáir vinnulívsmenn fáa 2,2 milliardir. Hann hevur fyrr verið inni á, at mátin, sum fiskivinnan verður stýrd í Føroyum ríkar nøkur fá tilvildarlig fólk, og vit enda við at fáa eitt fámannaveldi. Tað vil siga, at at nøkur fá koma at eiga milliardir og harvið koma at eiga alt vinnulívið og koma at taka allar stórar avgerðir í samfelagnum.

– Tað hevði verið nógv betri fyri føroyska búskapin, um politikararnir tóku eitt tilfeingisgjald, sum svaraði til virðið á veiðirættindunum, og góvu fólki ein skattalætta uppá 5-600 milliónir. Hetta hevði merkt, at skatturin hjá vanligum løntakarum hevði verið um 2.500 kr. minni um mánaðin. Ein familja við tveimum inntøkum hevði sostatt kunna havt um 5.000 kr. meir í tøkari inntøku um mánaðin, sigur hann.

Vilja ikki loysa trupuleikan

Ein slíkur skattalætti hevði eisini økt keypsorkuna nógv í Føroyum og fingið virksemið í gongd aftur og kundi fingið fólkastreymin at vent aftur til Føroya í staðin fyri støðugu fráflytingina, sum hevur kostað Føroyum 2300 nettofráflytingar seinastu 10 árini, heldur Kári Petersen.

– Niðurstøðan má vera, at meirilutin av føroyskum politikarum ikki vil geva Føroya fólki skattalættan, sum kann geva hvørjari familju 5.000 kr. eyka meira um mánaðin at liva fyri. Teir vilja ikki hava gongd á búskapin aftur. Teir vilja heldur hava fólkafráflyting enn fólkatilflyting. Meirilutin av føroyskum politikarum vil heldur geva nøkrum fáum ríkum reiðarum 5-600 milliónir krónur um árið komandi fýra árini, so teir kunnu heva sær 2,2 milliardir út úr fiskivinnuni, sigur Kári Petersen.

Jørgen Niclasen, fíggjarmálaráðharri, hevur sagt, at tað ikki er gott fyri samfelagsbúskapin, at koyra eitt stórt tilfeingisgjald beinleiðis inn í fíggjárlógina, men hetta nýtist ikki at vera nøkur forðing, sigur Kári Petersen.

– Tað er møguligt at gera hesar broytingar í stigum, og tað er eingin ivi um, at selir landsstýrið veiðurættindini til fiskivinnuna sum heild, er hetta ein varandi inntøka, sigur Kári Petersen. Tey tølini, sum hann byggir útrokningarnar, sum her eru nevndar á, eru einans frá pelagisku vinnuni.

marjun@sosialurin.fo

Vinningsbýtið hjá pelagiska flotanum	2008	2009	2010	2011	2012	2013	2014	2015
Útflutningur av pelagiskum fiski	381	407	706	1102	1312	1346	2050*	2050*
Søla	548	443	776	1027	1075	1150*	1850*	1850*
Aðrar útreiðslur	238	167	266	379	428	430*	430*	430*
Starvsfólkakostnaður	180	141	237	306	319	345*	555*	555*
Avskrivingar	66	86	92	99	100	100*	100*	100*
Úrslit áðr. óvanligt	-34	0	160	235	214	275*	765*	765*
Óvanlig inntøka	312							
Skattur	49	6	30	48	46	61*	168*	168*
Úrslit eftir skatt	229	-6	130	188	168	200*	597*	597*
Vinningsbýti	**74**	**70**	**125**	**151**	**146**	**150***	**550***	**550***
Eginogn	**425**	**120**	**135**	**369**	**420**			
Tøkur peningur	**193**	**149**	**251**	**310**	**228**			
Tal av skipum	**11**	**9**	**8**	**11**	**11**			

Keldur: Grannskoðaravirkið Januar, Hagstovan, tølini fyri 2013 til 2015 eru egnar útrokningar

*METT

Kári Petersen, búskaparfrøðingur, hevur mett um avreiðingarvirðið í pelagisku vinnuni fyri 2014 og 2015. Haraftrat hevur hann hugt eftir, hvussu nógv er tikið út sum vinningsbýti í fiskivinnnuni sum heild og í pelagisku vinnuni seinastu 10 árini. Tølini skulu takast við tí fyrivarni, at summi reiðarafeløg hava eitt holdingfelag, har vinningsbýtið verður koyrt í. Tað kunnu tískil vera gjørdar íløgur í vinnnuna við hesum pengum uttan at tað sæst í roknskapinum. Hinvegin kunnu eisini stórar nøgdir av peningi vera tiknar út, uttan at tað sæst í tølunum, til dømis um skip verða seld við loyvum fyri fleiri hundratals milliónir.

máta, hvussu stórt yvirskotið er. Fyrsti hátturin at máta yvirskotið uppá er eginpeningsavkastið. Hetta merkir, at um tú setir eginpening í eitt felag, so vísir hetta talið, hvussu stórt prosentvís avkast tú ført av eginpeninginum. Sum tølini vísa, so hava skipini havt so stór yvirskot, at eginpeningurin longu er forrentaður fleiri 100 prosent í hesum skipunum. Í vinnum við kapping hendir hetta ikki, tí eitt slíkt yvirskot hevði ført til, at fleiri fyritøkur høvdu komið inn at roynt seg í kappingini. Eitt so stórt yvirskot kemur bert fram, tí landsstýrið gevur tilfeingið burtur til nakrar fáar fyri einki.

Niðurstøðurnar eru fýra.

1. Fyrsta er, at yvirskotini fleirduplast frá 2009 og frameftir, tá vit taka okkum rættin til hægri makrelkvotu, og landsstýrið síðan gevur rættindini til nakrar fáar reiðarar.
2. Næsta er, at yvirskotini í pelagisku vinnuni eru so stór, at tey geva avkast, sum er fleiri ferðir tað, sum er í øðrum vinnum.
3. Triðja niðurstøðan er, at tað er eitt stórt yvirnormalt avkast í pelagisku vinnuni. Ein tilfeingisrenta er eitt yvirskot, sum er útyvir eitt vanligt yvirskot í tí ávísu tilfeingisvinnuni, sum stavar frá einum einkarrætti at gagnnýta eitt náttúrutilfeingi.
4. Fjórða niðurstøðan er, at yvirskotið í pelagisku vinnuni mest stavar frá, at landsstýrið gevur teimum eina dýra og nógv verda gávu, nevniliga fiskirættindi, fyri einki.

Yvirskotini eru so stór, at skipini kundu verið útgoldin eftir 4 árum.

Næsti hátturin at máta yvirskotini er at máta, hvussu nógv er avkastið upp á samlaðu íløguna í skip og uppkeypt veiðirættindi. Hetta sigur nakað um, hvussu skjótt tú kanst útgjalda íløguna í skipið og keyptu veiðirættindini. Her síggja vit, at avkastið er oman fyri 25 prosent av samlaðu iløguni. Tað ber sostatt til at gera eina íløgu í eitt skip, og útgjalda øll bankalán eftir 4-5 árum.

Úr hesum fáa vit tvær niðurstøður.

1. Fyrsta niðurstøðan er, at yvirskotini eru nógv størri enn í øðrum vinnum.
2. Onnur niðurstøðan er, at yvirskotini eru sera stór, tí tá ein ger íløgu í skip verður vanliga mett, at tey halda í 20 ár. Í pelagisku vinnuni eru yvirskotini eru so stór, at skipini (tvs. bæði lán og eginfígging) kunnu afturgjaldast eftir 5-6 árum.

Yvirskotið í pelagisku vinnuni er stórt, tí tað stavar frá einari gávu

Jógvan Jespersen, sum er talsmaður fyri felagið Nótaskip sigur, at yvirskotini eru so stór í pelagisku vinnuni, tí reiðararnir í pelagisku vinnuni hava rationaliserað, og duga væl at planleggja.

Alt gott um reiðararnar. Teir, sum eg kenni, eru skilamenn. Men vilja Jógvan Jespersen og Felagið Nótaskip veruliga hava okkum at trúgva, at teir eru fleiri ferðirnar dugnaligari enn øll onnur í vinnulívinum? Ella vilja teir vera við, at øll onnur vinnulívsfólk eru ódugnalig?

Hesin pástandurin er sjálvandi skeivur. Tað rætta er sjálvandi, at ein partur av yvirskotunum (normalyvirskotið) í pelagisku vinnuni stavar frá dugnaligari leiðslu í pelagisku vinnuni. Men størri parturin av vinninginum (yvirnormala yvirskotið) stavar frá, at landsstýrið útlutar stór virðir ókeypis til vinnuna.

Yvirskotið í pelagisku vinnuni er so stórt, tí landsstýrið gevur reiðarunum ein fiskirætt fyri einki, sum er fleiri hundrað milliónir verdur hvørt ár. Landsstýrið forðar øðrum at sleppa inn, og tí er hetta eitt reint monopolyvirskot.

Annars eru fleiri pástandir, sum eg ikki skilji, hvar Jógvan hevur frá:

Uppáhald 1. *“Tí er avgerandi, at vit ikki økja um fiskiorkuna, sum summi mæla til.”*

Svar: Eg trúgvi ikki, at nakar búskaparfrøðingur hevur mælt til at økja fiskiorkuna. Jógvan veit kanska at siga, hvør tann skuldsetti er.

Uppáhald 2: *“Somu búskaparfrøðingar siga, at málsetningurin má vera, at tey dugnaligastu reiðaríini yvirliva. Tað er væl tað sum er hent í nótaflotanum.”*

Svar: Hetta uppáhald er púra skeivt. Eingin kapping er, sum ger, at tann sum dugir best at fáa burtur úr rávøruni sleppir framat. Veiðirættindini verða givin soleiðis, at tað í besta lagi er rættiliga tilvildarligt, hvør verður útnevdur av landsstýrinum til at verða milliardingur. Í ringasta føri er tað tey, sum hava best samband til landsstýrismannin ella samgongumenn. Verandi skipan mótarbeiðir, at tað eru tey, sum duga best, ið sleppa at gagnnýta føroyska fiskatilfeingið.

Uppáhald 3: *“Vinningurin, sum hevur verið eftir hjá reiðaríunum hesi árini, er allur farin til nýggjar íløgur.”*

Svar: Reiðaríini í Felagnum Nótaskip fara sambært Jógvan Jespersen væntandi at gera íløgur á 700 mió. kr. í árunum 2008-14. Tað ljóðar gott, men eg vóni, at vit øll høvdu gjørt nógvar íløgur, um vit fingu so stórar gávur frá landsstýrinum. Her er tó eisini tað at siga, at fyri at gera íløgur upp á 700 mió. kr. er vanliga ikki neyðugt at nýta meir enn umleið 175 mió. kr. í eginpeningi frá konsernmóðirfelagnum sjálvum, svarandi til 25 prosent av íløguni. Tað hevði verið áhugavert, um Jógvan Jespersen greiddi frá, hvussu nógv feløgini hava brúkt av sínum egnu pengum fyri at gera hesar íløgurnar upp á 700 mió. kr. Í sama tíðarskeiði, 2008-14, sum feløgini fara at gera íløgur fyri umleið 175 mió. kr., fara reiðaríini við óbroyttari lóggávu at vinna sær einar 1400 mió. kr.

Annars verður sagt í greinini, at milliardin í vinningsbýti varð til 5 milliónir. Hetta er ikki rætt. Í greinini tók eg greitt fyrivarni fyri, at eg ikki hevði kannað, hvat móðirfeløgini nýttu peningin til. Sitat: *“Tølini skulu takast við tí fyrivarni, at summi feløg hava eitt holdingfelag, har tey kunnu seta pengar sínar inn. Tað kunnu tískil vera gjørdar íløgur í vinnuna við hesum pengunum uttan at tað sæst á roknskapunum.”*

Hetta fyrivarni stóð enntá tvær ferðir. Kortini varð hetta lagt út, sum at eg ikki dugdi at rokna. Eitt sindur unfair. Nokkso vanligt, tá onkur ikki ynskir at tosa um tað, sum tað veruliga snýr seg um.

Trupulleikin er jú ikki, at feløgini taka stór vinningsbýti úr pelagisku reiðarínunum. Tað sum er galið, er, at yvirskotini eru so ovurstór, tí landsstýrið gevur gávur (veiðirættindi) upp á hundraðtals milliónir árliga til nakrar fáar, sum so kunnu takast út úr pelagisku vinnuni. Hetta hevur einki við dugnasemi at gera.

Til seinast. Jógvan Jespersen sigur, at nótaflotin er í andgletti. Persónliga trúgvi eg ikki tað er rætt fatað. Eg rokni við, at tey flestu klára at gjøgnumskoða hetta, og síggja, at teir sum tað er nakað galið við, er teir politikararnir, sum verja verandi samfelagskaðiligu fiskivinnuskipan.



Ein milliard, sum bleiv til 5 milliónir

Jógvan Jespersen
Felagið Nótaskip

Bert tvey upprunalig loyvir

Landið fær sítt